# Kvinnurnar hava orðið

**Áhugabólkur Klaksvíkar Húsmøðrafelag skipar mánakvøldið fyri almennum politiskum fundi við teim kvinnuligu løgtingsvalevnunum í Norðoyggjum**

LØGTINGSVAL
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Eins og undan seinasta løgtingsvali og býráðsvali skipar Áhugabólkur Klaksvíkar Húsmøðrafelag mánakvøldið fyri almennum politiskum fundi við teim kvinnuligu valevnunum í Norðoyggjum.

### Einans 27 prosent

10 kvinnur stilla hesu ferð upp í Norðoya Valdømi. Samanbera vit við tey mannligu valevnini, sum eru 27 í tali, vísir tað seg, at kvinnurnar tilsamans telja 27 prosent av teim, sum bjóða seg fram, meðan menninir telja heili 73 prosent.

Býtið av kvinnum millum flokkarnar sær annars soleiðis út:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fólkaflokkurin: | 1 av 7 | = | 14,3 % |
| Sambandsflokkurin: | 1 av 7 | = | 14,3 % |
| Javnaðarflokkurin: | 2 av 7 | = | 28,6 % |
| Sjálvstýrisflokkurin: | 2 av 7 | = | 28,6 % |
| Tjóðveldisflokkurin: | 3 av 6 | = | 50,0 % |
| Miðflokkurin: | 1 av 3 | = | 33,3 % |

### Hugnaløta

Fundurin verður skipaður sum ein politisk hugnaløta, har hvør flokkur fyrst fær 10 minuttir at leggja sjónarmið síni fram. Eftir hetta verður skipað fyri orðaskifti, har áhoyrararnir fáa høvi at seta valevnunum ymsar spurningar.

Afturvið øllum hesi verður so eisini ein góður drekkamuður at fáa.

Tiltakið er alment, og verður í Bøgøtu 3 mánakvøldið tann 22. apríl klokkan 19.30.





# 3 umsøkjarar til prestastarvið í Hvalvík

**Enn er ikki avgjørt, hvør verður settur í prestastarvið í Hvalvík, sum her fyri varð lýst leyst at søkja**

PRESTASTARV
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Hvalvík:** Kirkjuráðið í Hvalvík hevur avgjørt at tosað við tveir av teim trimum umsøkjarunum, sum hava søkt um prestastarvið í Hvalvík.

Hetta verður gjørt á einum fundi, har kirkjuráðið hevur møguleika at koma at kenna umsøkjararnar betur. Enn er ikki avgjørt, nær hesin fundur verður, men væntandi verður hetta í heilt skjótt.

Tá kirkjuráðið hevur tosað við umsøkjararnar, verður ein innstilling til prestastarvið gjørd, og hendan verður so send Kirkjumálaráðnum til góðkenningar.

Síðan verður tosað aftur við umsøkjaran, sum fær starvið, og eftir avtalu við hann verður so endaliga kunngjørt, hvør hesin er.

Tann nýggja lóggávan gevur kirkjuráðnum betur stundir at finna útav, hvør tann rætti er til starvið.

Í gomlu lóggávuni skuldi innstillingin til prestastarvið verða liðug, longu tvey samdøgur eftir fundin millum kirkjuráðið og umsøkjararnir.

Men í nýggju lóggávuni kunnu ganga heilar seks vikur, áðrenn nøkur innstilling verður gjørd.

Martin Joensen 100 ár:

# Minnast høvundin í Sandvík í dag

**Í kvøld verður hátíðarhald í Sandvík í samband við 100 ára dag. Heimbygdin minnist og heiðrar skaldið á degnum við stórari almennari kvøldsetu og minnisvarðin verður fluttur á nýtt og fríðkað øki**

HÁTÍÐARHALD
*Dagfinn Olsen*

Í dag eru 100 ár síðani, at høvundurin Martin Joensen var føddur í Sandvík.

Í hesum sambandi verður skipað fyri tiltøkum í Sandvík, ið fostraði henda stóra føroyska høvund, ið er kendur fyri stuttsøgur og skaldsøgur.

Minnirvarðin í bygdini yvir Martin Joensen verður fluttur á nýtt øki mitt í bygdini, sum bygdaráðið hevur latið fríðkað.

Klokkan 18.30 fer bygdaráðsformaðurin í Hvalbiar sókn formliga at lata økið til sandvíkingar í minninum um Martin Joensen.

Steinbjørn B. Jacobsen, høvundur, lesur upp yrking, hann skrivaði, tá Martin Joensen doyði.

### Kvøldseta

Aftaná verður almenn kvøldseta í bygdarhúsinum, har framsýning er av verkum Martins og av tí, onnur hava skrivað um hann. Hanus Kamban, høvundur, hevur fyrilestur um bókmentaverk Martins, og Álvur Enni, lærari á Tvøroyri, heldur fyrilestur, sum pápi hansara Johannus Enni, sáli, skrivaði um barnabókmentir Martins.

Lisið verður upp úr verkum Martin Joensens.

### Væl dámdur

Martin Joensen var føddur í Sandvík 19. apríl í 1902. Í stuttum kann sigast um hann, at hann telist millum fremstu høvundar okkara. Skúlabørn, nú sum áður, kenna óivað søgurnar um Elin Mariu, um sjórænarar, sum endaðu í kyksendinum, um familjuna, ið mátti frá húsi og heimi í søguni "Húsvillur", fyri bert at nevna nakrar.

Umframt eru jú skaldsøgurnar, har tey flestu kenna "Fiskimenn".

Martin hevur verið mettur sum høvundur, ið gav bygdalívinum ans, eins og teim minni mentu, teimum, ið vóru fyri órætti. Hann var stóri humanisturin.

Og uttan hóvasták dugdi hann at greiða frá, lýsa, gerandislívið fyrrapartin av farnu øld. Gerndislív, trong kor, ið júst mangan mundi vera merkt av, at høgt í metum var ikki at gera nógv burturúr sær sjálvum.

Martin Joensen fór á Háskúla og fekk eggjan at fara á Læraraskúla, heldur enn at fara handilsvegin, sum hann hevði hugsað. Hann tók lærarapróvg í 1926. Fyrstu ritroyndir hansara komu í næmingabløðini á Háskúlanum og Læraraskúlanum, Tjaldur og Snarljós.

Hann var lærari á Økrum og Víkarbyrgi og í Lopra eitt skifti. Í 1929 gjørdist hann lærari í Sandvík og var har, til hann í 1944 tók við lærarastarvið á Tvøroyri.

Hann var deknur í Sandvíkar kirkju, limur í bygdaráðnum í Hvalbiar Sókn og eisini var hann eina tíð blaðstjóri á Sosialinum.

Seinastu árini bilaði heilsan og Martin Joensen doyði 64 ára gamal jóladag í 1966.

Meira verður at lesa um Martin Joensen og skaldskap hansara í blaðnum í morgin og í næstu viku.

Tey, ið fyrireika hátíðarhaldið í Sandvík í dag, eru Levi Niclasen, Álvur Enni, Jákup Jensen, Rannveig Hovgaard, Emmy Klettheyggj, Jákup Kjærbo og Snorri Thomsen.

Dansifeløgini í oynni taka lut í kvøldsetuni.



# Martin Joensen 100 ár

**Atli P. Dam**

**Atli Dam, fyrrverandi løgmaður, hugleiðir um skaldið, Martin Joensen, sum í dag hevði fylt 100 ár. Martin doyði jóladag í 1966.**

Serstakt vinarlag var ímillum húsini hjá Martin Joensen og Petur Mohr Dam, og var hetta nakað av tí, sum ávirkaði meg og systkini í barna- og uppvakstrarárunum í trýati- og fýratiárunum.

Tá á døgum framdi tú ikki ørindi ímillum eina smábygd í Suðuroynni og Tvøroyri sama dag. Oftast gekst tú yvir fjøll og noyddist at gista í minsta lagi eina nátt á Tvøroyri.

Martin og Lina hildu so til hjá okkum, tá tey vitjaðu á Tvøroyri hvørt sær ella saman við børnunum Regini og Ásu, sum vóru javnaldrar ávikavíst míns og Finngerð.

Áðrenn Martin í 1944 fekk starv á Tvøroyri, var eg nakrar ferðir í summarfrí í Sandvík, og hóast hetta var í teim døpru stríðsárunum, var tað stór og spennandi uppliving at nema felagsskap við javnaldrar og vaksin í hesi vøkru bygd, har tað var so vítt um at fara og so mangt serstakt at spæla ella takast við. Seinni havi eg so ásannað, at hesar vitjanir í eini hini fremstu mentabygdini og kunnleikin til jørildið Martin spratt úr og vaks í gjørdist førleikamennandi fyri meg, ikki minst høvið til at lýða á áhugaverdu frásagnir Louisu móður Martins um ævintýr, sagnir, náttúrlig og yvirnáttúrlig fyribrigdi ella gamlar tíðir gjørdist siðsøgulig barlast, ein kundi taka við sær, var sinnið opið.

Martin og pápi høvdu nógvan felagsskap, fakliga sum lærarar, mentunnarliga báðir við alski til føroyskt mál og bókmentir, og ikki minst politiskt tí teir stríddist út frá somu hugsjón um, at sosialisman var tann politiska samlívsskipan, sum kundi veita fjøldini frægastu materiellu korini, samstundis sum hon veitti rúmasta frælsi bæði tjóðskaparliga og persónliga. Tá á døgum trýsti so mangt okið enn vanliga fólkið og fjøtraði hin einstaka, sum Martin eisini lýsir á sín serliga og sannførandi hátt

Tá so Lina og Martin settu búgv á Tvøroyri nærkaðist enn meira ímillum vinfólkini, og minnist eg hesi ríku ár, sum vóru húsini næstan samanvaksin, tí alt sum var uppi hjá øðrum partinum, hátíðardagar, konfirmatiónir, føðingardagar, ja alt veitsluhald, luttók hin parturin í.

M.a. vóru móðir og Lina í sama bindiklubba, hildu mangt kortablaðið tá høvið beyðst og hjálptu hvør aðrari, tá á stóð, meðan pápi og Martin oftast umrøddu álvarsmál av øllum handa slag, ja teir fevndu og ferðaðust so víða sum hugflog ber.

At eg sjálvur í 1947 kom at búgva hjá Linu og Martin í nakrar mánaðir og at Louisa ofta búði styttri og longri tíðarskeið hjá okkum gjørdi sítt til, at ein heldur seg kenna Martin og umstøður hans rættiliga væl.

Hesi minnisbrot eru ikki ætlað at røkka sum bókmentafrøðiligt ummæli av skaldskapi Martins. Heldur ein tøkk fyri tað, hann vakti í mær og ein ásannan av virðing fyri manninum – persóninum – Martin Joensen og tí, hann lærdi um lívið í tí, hann lýsti í søgu og frásøgn.

Mær tørvar ongan bókaummælara at sannføra um, at tað sum kom á prent eftir Martin eru varðar, sum ongantíð rapa.

Fyri mær er hann eitt hitt størsta skald, eg veit um. Men tað kennist sum serligur frammíhjárættur at hava livað í sama húsi sum hann, meðan hann skapti nakað av hesum.

Í 1947 var hann farin undir at skrivað »Tað lýsir á landi«. Í einum kamari í eysturendanum av húsum Annu Mohr´s á Tanganum skrivaði hann nærum hvønn dag brot til hesa bók, onkuntíð kundi hann røða um hetta, men tað var tó sjálvdan, tó so, vit gittu at hann ikki var fallin í fátt, hóast fíggjarligu byrðarnar av útgávuni av »Fiskimonnum« árið fyri ongantíð vóru tyngri enn júst tá, tí tað gekk so illa í hond, at bókin kom so seint frá prenting, at nærum onki kom undir jólasøluna í 1946.

Pappírstrot, illvilji ella politiskur mótburður, eg veit tað ikki, men ráðini vóru smá, tí lærarar fingu onga lænarhækking ímillum 1940 og 1949.

Martin var álvarsmaður, men kundi í veitslulagi verða sera skemtingarsamur tað minnist eg, tá hann av og á talaði við borðhald til rundar dagar í heimi mínum.

Við Tvøroyrar skúla var hesa seinnu helvt av fýratiárunum eitt lið av lærarum, sum løgdu stóran dent á at geva ein góðan málsligan førning, og sum megnaðu at skapa virðing hjá okkum næmingum fyri góðum málburði.

Petur Mohr Dam, Jákup Olsen og Martin Joensen var eg so heppin at hava í føroyskum, og ikki minst Martin er í huga mínum ein fyrimynd.

Tíverri fór heilsan hjá Martini at bila álvarsliga longu í fimtiárunum og varð hann noyddur at leggja frá sær í 1964. Hetta gjørdi nógvar árgangir av næmingum á Tvøroyri fátækari, tí teir mistu tann tjansin vit, sum undan fóru, fingu.

Martin var blaðstjóri á Sosialinum árini 1946-47-48 og 49. Júst í teirri tíð, tá mest leikaði á, tí ágangurin frá tí »harralyndi«, sum lá yvir samfelagnum tá, var so ógvusligur.

Martin vardi borg á siðiligan, hampuligan og sannførandi hátt, væl stuðlaður av øðrum andshøvdingum í okkara landi. Hesum eru vit Martini sera takksom fyri.

Vil enda hesa persónligu kvøðu við at heita á tykkum, sum nú stíla fyri á Sosialinum, um at endurprenta minningarorð faðirs míns við deyða Martins, sum hann skrivaði í blaðið 4/1-1967. Hóskandi hevði tað verið, um hetta kom í blaðið 19. apríl, tá Martin vildi verið 100 ár.



*Mær tørvar ongan bókaummælara at sannføra um, at tað sum kom á prent eftir Martin eru varðar, sum ongantíð rapa, sigur Atli Dam*

## Minningarorð um skaldið Martin Joensen

**Eftir áheitan endurprentað vit minningarorðini, sum P. M. Dam skrivði um Martin Joensen, 4. januar 1967.**

Fyrsta jóladag 1966 slóknaði eitt av okkara bjartastu ljósum: Skaldið Martin Joensen, lærari á Tvøroyri er so ikki meiri millum tey livandi.

Hold hansara!

Andi hansara og navn slókna ongantíð.

So bjart skinu og skína tey.

Martin var frálíkur lærari. Kunnskaparríkur sum fáur. Sálin brann. Tað er ikki av ongum, at føðibygd hansara eftir støddini er ríkari enn flestar bygdir uppá lærdar menn og kvinnur, prestar og lærarar.

– Tey sótu við føtur Martins og vuksu og hitnaðu undir hansara vekjandi og fløgandi anda.

»Hann gav mær tað, sum eingin onnur menniskja hevur givið mær síðani, heldur ikki teir á teimum hægru og størru skúlunum, eg havi vitja seinri« tók ein av hansara takksomu næmingum til orða undir eini samrøðu um valamenn, stórar menn.

Hann setti Martin millum teir størstu, hann hevði kent.

– Tað var vitnisburður Jóhann Nielsens prests.

»Martin var eikin í skaldaskógvi okkara,« tók annar av frægu bygdamonnum hansara til.

Minnið um Martin sum lærara í hansara bestu árum, áðrenn hann varð sjúkur, vil lýsa bjart millum hansara næmingar. Lýsa so leingi, ið teir liva.

Minni um Martin sum skald vil lýsa bjartari í hvørjum, sum tíðin líðir frá. Lýsa fyri Føroya fólki.

Hvør kann seta fiskimonnunum ein dýrmettari varða enn Martin í bók síni »FISKIMENN«!

Hvør kann seta fólkinum og mannalívinum í tíðarskeiðinum, sum fyri mesta partin nú er horvið, ein bjartari varða enn Martin í bókum og mongu skaldsøgum sínum!

– – –

Martin Joensen var millum bestu vinir mínar.

Allar tær hugnaligu og ríku løturnar, vit vóru saman, verða at lýsa og framvegis bera mær av tí ríkidømi, hann goymdi í sál síni.

Eg og heim mítt vilja sakna Martin sum hin trúgva vinin.

Hann var, til tess sjúkan bant hann inni ella burturi til sjúkrarøktarviðgerð, dagligur gestur í heimi okkara og gjørdi tað høgt til loftið og vítt til veggja við ríka hugsjónarheimi sínum og ansi fyri tí skemtingarsama.

Vit veita honum okkara hjartans tøkk fyri tað, ið hann gav okkum.

Sum tann skila- og álitismaður Martin Joensen var, var hann í læraratíð síni í Sandvík í fleiri sóknarstýrisskeiðum valdur í stýrið fyri Hvalbiar sóknar kommunu og royndist sannur framburðsmaður fyri bygd sína. Tað skyldast ikki minst honum, at Sandvíkin fekk tað eftir tátíðini góðu bryggju við frálíkum bátauppdrátti.

– – –

Martin Joensen var javnaðarmaður og eina tíð var hann blaðstjóri á blaði okkara Sosialinum. Navn hansara og pennur bar blaðnum virðing millum manna.

Flokkur okkara kennir missin av hesum andsmenni sum nívandi sakn, tí, hansara orð og luttøka í flokksins stríði fyri teirri sonnu sosialistisku stevnuni vigaðu og týddu almikið og her verður ikki lætt at seta mann í manns stað.

Føroya javnaðarflokkur og Sosialurin síða merkið í sorg við báru stríðsfelagsins og hugsjónarmannsins, men vit draga tað aftur á fulla stong, í tøkklæti, í gleðini og stoltleikanum yvir at hava talt so gævan mann í liði okkara.

Friður og signing lýsi yvir minni tínum, vinur mín og felagi!

Í Vestmanna, tann 26. des. 1966

***Pætur***